## Dystir um vikuskiftið

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 20.05 | AB-EB/S | Jens Petur Brattalíð |
| 20.05 | GÍ-HB | Eiler Rasmussen |
| 20.05 | Skála-NSÍ | Lars Müller |
| 20.05 | B71-KÍ | Rúni Gaardbo |
| 20.05 | B36-VB/S | Dagfinn Olsen |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 19.05 | B36-FSV04 | Vinjard Dam |
| 19.05 | KÍ-HB | Jóannes Mikkelsen |
| 19.05 | NSÍ-TB | Bárður Mortensen |
| 19.05 | SÍ-ÍF | Petur Reinert |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | GÍ-B36 | Hagbard Joensen |
| 20.05 | Skála-MB | Alex Troleis |
| 20.05 | ÍF-EB/S | Bjarki Danielsen |
| 20.05 | B68-FSV04 | Eugen Voda |
| 20.05 | Fram-KÍ | Jóhan P. Michelsen |

# Dysturin um Skála

**Grannauppgerðin er kanska størsti dysturin hjá Skála og NSÍ. Ikki minst á Skála er spenningurin stórur, nú tveir venjarar og fýra spælarar, sum vóru í orangju í fjør, nú umboða gula búnan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í høvuðsstaðnum hevur í fleiri ár verið tosað um slagiðum Havnina. Stórdystirnir millum B36 og HB standa høgt í metum millum manna, og tó at spælið ikki hvørja ferð rakar hæddirnar, so er intensiteturin aloftast í toppi.

Og soleiðis er eisini, tá Skála og NSÍ takast. Hóast NSÍ hevur tær drúgvaru royndirnar av teimum báðum, so er talan um lutfalsliga nýggj lið í føroyskum fótbólti. Men hetta seinasta merkir ikki, at ambitiónirnar ikki eru stórar.

Í Runavík hava tey í føðingardagsárinum veruliga sett nøsina móti gullinum. Ein partur av uppskriftini hevur verið at fara vestur um fjørðin eftir fólki á bæði venjara- og spælarasíðuni. Við Johan Nielsen og Paula Poulsen við róðrið hevur liðið í øllum førum eina sera dugnaliga venjaraduo, og framman undan sterki hópurin varð í ár enn sterkari við millum øðrum Jónhard Frederiksberg, Nenad Stankovic, Jóhan Troest Davidsen og Debes Danielsen, ið allir hava skift frá Skála. Jóhan og Debes hava tó fingið sína fótbóltsuppaling í NSÍ.

- Hetta er ein uppgerð um, hvør er bestur í kommununi. Júst sum tað er í Havn millum B36 og HB. Vit hava kanska ikki so nógv ár í hesi rivalisering, men dysturin er avgjørt ikki vorðin minni, nú NSÍ hevur tikið bæði venjarar og spælarar frá okkum.

Soleiðis sigur Alexandur Johansen hjá Skála, sum er ivaleysur í, at talan verður um ein dyst við nógvum og hørðum nærdystum, og har báðir partar leggja alla orku í at vinna.

Stevna er eisini á Skála, og sum Alexandur tekur til, so skal hendan helst enda við, at Skála fær steyp eftir sigur á NSÍ.

### Gleðin komin aftur

Skála tóktist vera í djúpari kreppu, tá kappingarárið byrjaði. Men síðani venjarin varð skiftur eftir fýra tap á rað, er av álvara komin vend í. Verður fjórðingsfinalan í Klaksvík roknað



## Við – ikki við

**Argja Bóltfelag:**
Ivasamur: Magnus E. Poulsen (fótlið)

**EB/Streymur:**
Leikbann: Hans Pauli Samuelsen
Ivasamur: Bárður Olsen
Skaddir: Sorin Anghel (fótlið), Arnbjørn T. Hansen (beinbrot), Knút Vesturtún, Esmar Eiðisgarð

**GÍ:**
Allir tøkir

**Havnar Bóltfelag:**
Allir tøkir

**Skála:**
Leikbann: Poul N. Poulsen
Ivasamur: Tony Rasmussen

## Hagtølini

Skal KÍ venda gongdini, so er dysturin á Sandi besta høvið. Ikki minst tí hagtølini avgjørt eru í parti við KÍ í hesum dystinum. Seinastu tíggju árini hevur KÍ fýra ferðir vitjað á Sandi, og hvørja ferð hevur talan verið um útisigur. Eisini staðfesta hagtølini, at HB trívist væl í Sarpugerði, og at B36 veruliga hevur tikið á VB/Sumba. Hagtøl í sjálvum sær siga tó einki, men ofta geva tey kortini eina góða ábending um dystirnar.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini um vikuskiftið havt dystast í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju árini.

-mørk